# Fundarfrágreiðing til HSF-limafund leygardagin 8. juni 2019

Luttakandi: Gunn Ellefsen, Jógvan Emil Nielsen, Oyvindur Brimnes, Djóni Højgaard, Annfinn Brekkstein fyri Starvsnevndina. Niels Winther fyri Aganevndina. Ári Rouch og Hallur Danielsen fyri umsitingina. Maibritt Johannesen, Súsanna K. Hansen fyri Kyndil. Andrea Heindriksdóttir fyri Neistan. Sunnuvá Vesturdal fyri EB. Janet Fríða Johannesen og Emy Sólvitsdóttir fyri H71. Robert Poulsen fyri KÍF. Helena Kallsberg og Bogi T. Ragnarsson fyri Team Klaksvík. Sámal Joensen, Johan Müller, Bjørg Patursson fyri VÍF. Kristina Griksaite og Miriam Weihe í Niðristovu fyri SÍF/Søljuna. Eyðbritt Krosslá fyri VB. Ikki umboðaði: StÍF, Stjørnan og ÍA

**1.0 Útlendingar á føroyskum liðum**
Í verandi leiðreglum verður ongin roknaður sum útlendingur, sum ikki er fyltur 21 ár innan 1. januar í kappingarárinum. Útyvir hetta kann eitt lið í mesta lagi hava tríggjar útlendskar leikarar á dómararseðlinum í senn, tá hava danir/grønlendingar verið íroknaðir.

Viðvíkjandi landliðsreglugerðini kunnu danir/grønlendingar, sum hava búð tvey ár í Føroyum og framvegis búgva í Føroyum takast út til føroyska landsliðið. Danir/grønlendingar, sum hava búð 7 ár í Føroyum tilsamans, kunnu takast út til føroyska hondbóltslandsliðið. Danir/grønlendingar, sum hava føroyska mammu ella pápa, og sum ikki búgva í Føroyum, kunnu takast út til føroyska hondbóltslandsliðið.

HSF ynskti, at feløgini tóku støðu til hvørt danir/grønlendingar, sum hava spælt í føroyskum hondbólti tvey heil undanfarin kappingarár, ikki skulu roknast sum útlendingar triðja árið teir leika í Føroyum. Í øðrum føri ynskir HSF, at feløgini tóku støðu til hvørt danir/grønlendingar yvirhøvur skulu roknast sum útlendingar á føroyskum liðum.

**1.1 Niðurstøða**
Samtykt var, at danir/grønlendingar ikki skulu roknast, sum útlendingar eftir tvey kappingarár í føroyskum hondbólti.

**2.0 Kappingarleistur hjá U18-deildunum**
U18-kappingin var í 2018-19 avgreidd í "stevnuform", har liðini spældu tveir hálvar dystir hvørja ferð og komu saman 3-4 ferðir fyri og eftir jól. Afturmeldingarnar frá feløgunum hava verið, at leisturin hevur eydnast minni væl, tí størsti parturin av leikaranum ganga aftur á antin U16 ella vaksnamannaliðum. Tað var umrøtt, hvørt skuldi farast aftur til gamla, vanliga leistin, har leikt verður ein dystur hvørja ferð, tó við tí tillaging, at kappingin ikki skuldi telja ov nógvar dystir og at dystirnir skullu liggja mánadagar, soleiðis at hetta ikki rennur saman við U16- ella vaksnamannakappgingina og at leikararnir ikki verða troyttir ov nógv.

**2.1 Niðurstøða:**
Tað var samtykt, at U18-kappingin skal verða vanligir landskappingardystir á 2x30, sum tó liggja mánadag. Samlaða dystartalið skal liggja um 12 dystir, sum verða deildir yvir kappingarárið.

**3.0 Kappingarleistur fyri fremstu deildir – 3 ella 5 finalur**
Umrøtt var, hvørt tað skuldu leikast tríggjar ella fimm finalur hjá monnum. Evnið var á skrá, av tí at tað hoyrdist í fleiri feløgum, at tað var ov drúgt við fimm finalur. Fundurin tóktist vilja halda fast við fimm finalum, men at hesar skuldu liggja tættari, helst allar eftir landsliðssteðgin í apríl.

**3.1 Niðurstøða:**
Samtykt var, at halda fast við at spælast skulu best av 5 finalum, sum tó liggja tættari eftir landsliðssteðgin.

**4.0 Hvør skal møta hvørjum í hálvfinalunum?**
Leisturin við at 1´arin í grundspælinum skal velja mótstøðulið í hálvfinalunum var umrøddur. Feløgini tóktust ikki dáma hendan leistin og ynskja at hetta skal broytast til at nr. 1 møtir nr. 4 og nr. 2 møtir nr. 3.

**4.1 Niðurstøða:**
Tað var samtykt, at broyta kappingarleistin soleiðis, at liðið sum endar nr. 1 í grundspælinum skal møta nr. 4 í hálvfinalunum, meðan nr. 2 og 3 møtast í hinari.

**5.0 Kappingarleistur – niðari bólkur**
Møguleikin at vinnarin av 1. deild kundi koma við í niðara endaspælið var umrøddur. Við hesum kann niðara endaspælið fylgja endaspælinum hjá ovara bólkinum. Leikarar, ið ikki hava fylt 21 ár innan tann 1. januar í kappingarárinum, kunnu enn frítt flyta ímillum liðini.

**5.1 Niðurstøða**:
Meiriluti var fyri at vinnarin av 1. deild sleppur at luttaka í niðara endaspælinum, tó skal kappingarnevndin eftirhyggja møguleikan, at leikarar, ið ikki hava fylt 21 ár innan tann 1. januar í kappingarárinum, enn kunnu frítt flyta ímillum liðini.

**6.0 Skulu leikast 24 dystir ella 18 dystir í grundspælinum? Vegleiðandi atkvøðagreiðsla**
Umrøtt var, hvørt tað skuldi leikast 18 ella 24 dystir í grundspælinum – tríggjar ella fýra ferðir ímóti hvørjum øðrum undan endaspælinum. Hetta svarar til ávikavist 21 og 28 umfør við 7 liðum í kvinnu- og mansdeildini (VB fer ætlandi at hava lið í bestu kvinnudeildini komandi kappingarár).

Við 21 umførum kemur dystartalið í minsta lagið uppá 21 og í mesta lagi uppá 26. Við 28 umførum kemur dystartalið í minsta lagið uppá 27 og í mesta lagi uppá 32

**6.1 Niðurstøða**:
Tepur meiriluti var fyri at 21 umfør/18 dystir skulu leikast. Tó var samtykt, at kappingarnevndin skuldi viðgera hetta víðari og senda kappingaruppskot til hoyringar hjá feløgunum.

**7.0 "Sjónleikaraparagraffin"**
Limafundur ynskti støðutakan til, hvørt "sjónleikaraparagraffin" skuldi setast í gildið í Føroyum. Her verður sipað til, tá ein leikari kemur til skaðis á vøllinum, kunnu dómararnir geva loyvi til, at leikarin fær hjálp frá bonkinum. Eftir hjálpina skal leikarin fara av vøllininum og skal hareftir sita uttanfyri í trý álop, smb. spælireglu 4.11, hetta verður bert galdandi fyri fremstu deild hjá kvinnum og monnum.

**7.1 Niðurstøða**:
Tað var samtykt at sjónleikaraparagraffin verður galdandi í fremstu deildunum í Føroyum.

**8.1 U16-leikarar í næstbestu deildini**
Fundurin umrøddi, um U16-leikarar skulu kunna spæla í næstbestu deildini? Í løtuni kunnu hesir leika í triðbestu deild, men fleiri ynskja at hesir eisini kunnu nýtast í næstbestu deildini.

**8.1 Niðurstøða**
Tað var samtykt, at U16-leikarar kunna spæla í næstbestu deildini.

**9.0 Leistur fyri kvinnufinalurnar**
Umrøtt var, hvørt kvinnufinalurnar skulu avgerðast eins og mansfinalurnar, soleiðis at hvør finala skal avgerðast. Tvs. er javnleikur eftir vanliga leiktíð, so verður eykatíð á 2x5 min., hareftir brotskøst verða skotin til avgerð er fallin.

**9.1 Niðurstøða**
Tað var samtykt, at allar kvinnufinalurnar avgerðast á sama hátt sum mansfinalurnar.

**Fundarskrivari:**
Ári Rouch